# Bart fyri mannarættindum í 53 ár



*Mánadagin vóru 53 ár liðin síðani Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða sá dagsins ljós. Hesin dagur varð hildin í Føroyum við at tendra 53 ljós kring Tinghúsvøllin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Mánadagin vóru 53 ár liðin síðani Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi sá dagsins ljós. Felagsskapurin Amnesty International er síðani grundaður á hesa heimsyvirlýsing, og varð føðingadagurin hildin á ymsan hátt kring heimin**

AMNESTY INTERNATIONAL
*Ingrid Bjarnastein*

Amnesty International Føroya Deild hevði valt at hátíðarhalda dagin við at tendra 53 ljós rundan um Tinghúsvøllin í Havn.

Kirkjuklokkan í Dómkirkjuni hevði júst fortalt havnafólki, at klokkan varð vorðin 16.30, og beint eftir hetta kveikti Annika Sølvará, forkvinna í Amnesty International Føroya deild, saman við børnum fyrstu ljósini rundan um Tinghúsvøllin.

Hetta var í skýmingini, veðrið var av tí fagrasta – stilt, men kalt. Nakað av fólki hevði leitað sær oman at síggja meðan ljósini vórðu tendrað.

Eftir, at Annika og nøkur børn høvdu tendrað fyrstu ljósini, gingu kyndlarnir runt, soleiðis, at onnur børn eisini sluppu framat at tendra eitt ljós. Tað gekk ikki leingi, so bleiktraðu øll 53 ljósini í skýmingini við stóra jólatræið á Tinghúsvøllinum. Eitt hugnaligt tiltak, sum tó vantaði eina heild. Kanska ein felagssang ella okkurt líknandi, sum sjóðaði tey, ið nú vóru komin saman.

Amnesty International felagsskapurin varð stovnaður í 1961, og hevði tískil fyrr í ár 40 ár á baki. Føroyska deildin varð stovnað fýra ár seinni, og telist hon millum tær elstu deildirnar Amnesty hevur kring knøttin.



Endamálið hjá felagsskapinum er at vera óheft politiskt virka fyri leyslating av kvinnum og monnum, ið, móti reglunum í Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi, eru fongslað vegna politiska sannføring, gudstrúgv, uppruna, kyn, húðarlit ella móðurmál, treytað av, at tey hvørki hava nýtt vald ella eggjað til valdsnýtslu. Tey verða nevnd samvitskufangar.

Dagurin varð annars merktur av, at eitt ljós varð tendrað fyri samvitskufangarnar og stillað í vindeygað.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólgtottar, men támut veður. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Fleyr til gul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av suðri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

– – –

November varð vátari enn vanligt, 169,5 mm móti miðal 148,5 mm. Miðalhitin varð 5,0° móti normalinum 4,9°.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | ÷14 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷5 |
| Bukarest | ÷5 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 7 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður eitt skifti tætt norðan fyri Føroyar. Eitt hátrýst, 1043 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga vestureftir.




Hátrýstið yvir Skotlandi stendur mestsum í stað og gevur góðveður komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/12 kl. 06⁰⁰– 11/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 10/12 kl. 06⁰⁰– 11/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 51,2 mm


Oyravernd
v/ FM Radio
Peltor



kr. 1.265,-
Fokus Electronic
Reynstún 19 · Argir · Tlf. 311306


## VESTFALLSKYRRINDI

6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter
14. des.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. des | 04.10 | 16.34 | 03.10 | 15.34 | 03.25 | 15.49 | 06.10 | 18.34 | 07.10 | 19.34 | 02.25 | 14.49 | 01.25 | 13.49 | 04.25 | 16.49 | 05.25 | 17.49 | 03.55 | 16.19 | 05.10 | 17.34 |
| 13. des | 04.59 | 17.24 | 03.59 | 16.24 | 04.14 | 16.39 | 06.59 | 19.24 | 07.59 | 20.24 | 03.14 | 15.39 | 02.14 | 14.39 | 05.14 | 17.39 | 06.14 | 18.39 | 04.44 | 17.09 | 05.59 | 18.24 |
| 14. des | 05.49 | 18.15 | 04.49 | 17.15 | 05.04 | 17.30 | 07.49 | 20.15 | 08.49 | 21.15 | 04.04 | 16.30 | 03.04 | 15.30 | 06.04 | 18.30 | 07.04 | 19.30 | 05.34 | 18.00 | 06.49 | 19.15 |
| 15. des | 06.44 | 19.15 | 05.44 | 18.15 | 05.59 | 18.30 | 08.44 | 21.15 | 09.44 | 22.15 | 04.59 | 17.30 | 03.59 | 16.30 | 06.59 | 19.30 | 07.59 | 20.30 | 06.29 | 19.00 | 07.44 | 20.15 |

5 707265 100036 >